LM-088/2023

Dylgrisljal H.

heilsutrygd

Klaksvík/Tórshavn 05.02.2024

Hoyringssvar til nýggja fosturtøkulóg

Gigni og Heilsutrygd hava viðgjørt uppskotið til nýggja fosturtøkulóg og senda hervið viðmerkingar.

Viðmerkingar eru býttar í tveir partar, har fyrri parturin eru viðmerkingar og spurningar til lógartekstin og almennu viðmerkingarnar, og seinni parturin eru viðmerkingar og spurningar til lógaruppskotið sum heild og nakrar grundleggjandi premissur.

§1

Tað verður sagt, at kvinnan kann fáa fosturtøku "eftir at hava fingið kunning og vegleiðing sambært §7." Men í greinini stendur, at kvinnan "skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu".

Tað kann ørkymla, at somu orð ikki verða nýtt í báðum paragraffum. Eisini er ein munur, at sambært §1 skal kvinnan hava fingið kunning og vegleiðing, har tað í §7 er talan um eitt tilboð.

Í viðmerkingunum til §1 (s.22) stendur: "Læknin hevur skyldu at tryggja sær, at kvinnan fær hesa kunning og vegleiðing. Tað er tó ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan hevur tikið av teimum tilboðum, sum eru tøk."

Tað er heldur ógreitt, hvør partur av hesum er kravd vegleiðing, og hvat er tilboð. Serliga, tá § 1 vísir til grein § 7, sum brúka ymiskar orðingar, ið ikki tykjast hava somu merking ella somu tyngd.

§3

Stk. 1. nr. 1 greiðir frá møguleikanum at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um talan er um vanda fyri heilsuni hjá kvinnuni. Men at enda í nr. 1 stendur: "... ella av lívsviðurskiftum hennara í aðramáta." Orðingin er óítøkilig, og viðmerkingarnar greiða ikki so væl frá, hvussu hetta skal skiljast. Tí kann hetta lesast sum ein "ventilur", sum kann nýtast at loyva fosturtøku eftir 12. viku, har treytirnar annars ikki eru loknar.

Í nr. 3 verður vandi fyri breki ella sjúku nevndur. Her hevði tað verið áhugavert og álitisvekjandi, um nærri varð greitt frá hesum í viðmerkingunum við dømum um sjúkur, og hvussu slík viðurskifti verða staðfest og viðgjørd?

Postsmoga 52 / Klaksvíksvegur 7 / FO-710 Klaksvík / Tlf. +298 61 40 00 / T-post: heilsutrygd@heilsutrygd.fo

Í nr. 5 kann undantak gevast fyri 12-viku regluni, um viðgongutíðin ella umsorganin er ein byrða, sum ikki slepst undan á annan hátt enn við fosturtøku.

Hvørji alternativ verður her hugsað um, og hvørjir instansir ella tilboð kunnu aktiverast fyri at arbeiða við alternativum? Kann tað tilskilast í lógini, hvussu tørvurin hjá kvinnuni skal útgreinast, soleiðis at ein neyðug hjálp verður ítøkilig og veruliga kann setast í verk? Tað kann t.d. vera fíggjarliga, læknaliga, sálarliga og hjálp til burturættleiðing.

Ímeðan tað ikki er so trupult at ímynda sær støður, sum kunnu føra til undantøk eftir nr. 1-4, so er tað ikki so við 5. Hvørjir upplýsingar ella viðurskifti kunnu vera, sum ikki vóru greið áðrenn 12. viku, sum kunnu geva orsøk til eina fosturtøku og tí undantak til 12-viku markið?

§7

Í viðmerkingunum til §7 stendur: "Ein sjálvstøðug og óheft fosturtøkuráðgeving verður skipað undir Heilsutrygd..." Seinni stendur: "Tað vera heilsufrøðingar hjá Gigna sum svara telefonini."

Til hetta er at viðmerkja, at heilsufrøðingar eru settir undir Gigni, sum er stovnur undir Heilsutrygd. Tað er ógreitt í viðmerkingunum, hvat liggur í hugtøkunum "sjálvstøðug og óheft". Á hvønn hátt verður ráðgevingin sjálvstøðug, og hvørjum skal hon vera óheft av?

§9

Tá talan er um kvinnur undir 18 ár, skal støða takast til, um foreldramyndugleikin skal geva samtykki (stk. 1.) ella um ein fosturtøka kann loyvast uttan samtykki (stk. 2. og stk. 3)

Fyri at kunna taka støðu til hetta, er neyðugt at meta um viðurskiftini millum kvinnuna/gentuna og foreldrini. Her kann tað helst vera ein stór hjálp, um biðið verður um upplýsingar frá heilsufrøðingi.

Um støðan er tann, at kommunulæknin er so stúrin um familjuviðurskiftini, at hann mælir frá, at foreldrini skulu verða biðin um at geva samtykki, eigur hann eisini at taka støðu til, um hann skal boða Barnaverndini frá. Meginreglan eigur at vera, at vælfungerandi foreldur megna at lofta einari gentu í hesi støðu.

§13

Í viðmerking á s. 31 verður møguleikin fyri at lata umsókn um fosturtøku inn talgilt nevndur. Her hevur tað týdning, at sjálvt um ein umsókn verður talgild, eigur ein møgulig umsókn altíð at fara til ein kommunulækna, sum so skal tryggja sær, at treytirnar um vegleiðing í §1 og §7 eru loknar. Hetta er fyri at tryggja, at kvinnan ikki ger eina umsókn í einum rúsi, undir hóttan, ella hon á annan hátt ikki kann metast at vera í javnvág.

§18

Stk. 2,3 og 4 verður tosað um at taka annans barnsburð. Hvør er munurin at taka annans barnsburð og fosturtøka?

Viðmerkingar annars

Á s. 7 stendur: "Tað kunnu vera nógvar og ymiskar orsøkir til, at ein kvinna umhugsar fosturtøku. Allar kvinnur kunnu koma í so truplar lívsstøður, at fosturtøka fyri tær er frægasti útvegur."

Her vilja vit vísa á, hvussu stóran týdning ráðgevingin og vegleiðingin hevur. Støður og umstøður kunnu broytast, og tí er neyðugt, at kvinnan eisini fær møguleika til at meta um langtíðarútlitini. Eftir førimuni, skal kvinnan latast í til at taka støðu bæði út frá núverandi støðu og møguligari framtíðarstøðu og -avleiðingum.